# Heimleysu harrarnir í húsinum

## Trupulleikin við mannfólkum er, at teir ikki hóska inn í modernaða innrætting. Tí eru hesir einaferð so erpnu húsharrarnir vorðnir heimleysir í egnum húsi

Einaferð vóru teir erpnir harrar í egnum húsi. Afturfyri fingu konurnar loyvi at seyma gardinur og velja seingjarklæði. Ein fín skipan – líka til konurnar hertóku alt húsið, so menninir máttu leita sær skjól í kjallarum, neystum og garasjum.

Har kundu teir so sita og putlast við, hvat tað so er, menn nú einaferð putlast við og annars fáa frið fyri júkandi konum og larmandi børnum.

Slett ikki so galið, so leingi friðurin vardi. Tað gjørdi hann bara ikki serliga leingi, tí áðrenn menninir vardu, høvdu kvinnurnar eisini gjørt seg til harrar yvir bæði innrætting og sjálvt húsakeypið. Og tá er tað also ikki nøkur sjálvfylgja longur, at kjallarar ella garasjur verða oyramerkt til mannfólka putlarí.





*Kanska verður gamaldags harrarúmið loysnin á trupulleikan at fáa mannfólkini at hóska inn í modernaðu heimini*

### Østrogenøki burturav

Tað er ikki vist, at teir vilja viðganga tað. Men kanningar vísa, at í bert tveimum prosentum av øllum húsakeypum í Danmark, er tað maðurin, ið tekur endaligu avgerðina. Í 34 prosentum er tað kvinnan einsamøll, ið hevur avgerðandi orðið.

Um tað er fyri at sleppa undan keglaríi, sigur søgan onki um, men sambært meklarafyritøkuni Home finna allarflestu menninir seg tigandi í, at kvinnan fær seinasta orðið.

Teir, ið ditta sær til at muta ímóti, verða skjótt og effektivt settir uppá pláss, veit meklarafyritøkan at siga.

Og slíkt vita slíkar fyritøkur helst, tí tær liva millum annað av at vita, hvønn tær skulu freista at keypa hús ella íbúð. Og her eru tað avgjørt kvinnurnar, ið eru mest áhugaverdar at fáa fatur á, verður sagt.

Komin inn um gáttina, eru vit á østrogenøki, so tað forslær. Út rúka stóru, klossutu hátalararnir frá 70'unum, sum hann kom dragandi við, og inn koma hennara hvítu sofur og krystalvasar. Nú ræður tað um at skapa rætta 'stemningin' og raka lekra stílin – og tað er also ikki tað slagi av stíli, sum stakkar av "Alt om bilen", fløkjur av leidningum og næstan-í-ordan videospælarar skapa.

Júst hvar, kvinnurnar ímynda sær at menninir skulu fara við teirra óruddi, er ilt at gita. Ì kjallaran? Neyvan, tí hann hava tannáringabørnini fingið til sjónvarpsstovu. Í garasjuna meðni – Niks, tí har er frúan í húsinum í ferð við at innrætta sær sín dreyma grovkøk.

### Harrin av WC'num

Men hvar fara allir hesi heimleysu húsharrarnir so? Jú, teir fara á WC. Í meðal brúka mannfólk tveir tímar longri á WC'num enn fyri bert fýra árum síðani. Og tað er also ikki tí, mannfólkamagarnir brádliga eru vorðnir so sera trekir. WC'ið er stutt sagt vorðið seinasta bastiónin hjá fyrrverandi harranum í húsinum, har hann kann verða sitandi